Løgmaður um Føroyar sum fremsta tjóð ár 2015:

# –Vit mugu øll taka lógvatak sa

VINNA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður: -Vit mugu leggja eina ætlan fyri Føroyar sum ein av fremstu tjóðum í heiminum til ár 2015*

*Mynd Jens K Vang*

– Føroyar eru við at verða afturúrsigldar á rættiliga nógvum økjum nú. Ein av høvuðsorsøkunum er tann, at vit oftani hava eina sera skinklandi tilgongd at taka avgerðir. Eg veit ikki, um tað er tað føroyska lyndið altíð at útseta ting, at bíða og kanska kanna meira osfr, sum er orsøkin! Og so hevur man brúkt orkuna í rættiliga langa tíð til eitt ávíst mál, sum hevur fylt so nógv, at einki annað mál er komið á dagsskrá sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, tá "Vinnusíðurnar" hann greiða eitt sindur nærri frá ætlanini um at gera Føroyar til eina av heimsins fremstu tjóðum í ár 2015.

Hóast løgmaður metir hetta málið verða so týðandi fyri okkum øll og tí ikki hevur hug til at blanda hvørki parta- ella samgongupolitikk uppí, so heldur hann kortini, at tað slepst ikki undan at vísa á eina av høvuðsorsøkunum til, at so lítið er hent á vinnuøkinum øll tey seinastu árini.

– Vit hava sitið í seks ár og tungt í hesum sama fullveldismálinum. Og tað slóð meg valkvøldið, at sigursharrarnir eftir fólkatingsvalið vóru júst teir, sum vóru fremstir í tí samgonguni, sum sat í seks ár og ongantíð vendu teimum fyri meg at síggja týdningarmestu spurningunum í samfelagnum, nevniliga, hvat við tí føroyska samfelagnum í framtíðini. Man hugsaði bara eftir ríkisrættarligum linjum. Man hugsaði als ikki um Føroyar í einum globaliseraðum heimi. Man hugsaði ikki um broyttan vinnubygnað ella nakað slíkt.

Løgmaður vísir á, at vinnan í Føroyum hungrar eftir, at samfelagið tekur hana í álvara og viðger, hvussu vinnan í framtíðini skal fóta sær og mugu vit tí spyrja, hvar mørk eru flutt á vinnuliga økinum í mun til kanska fyri 10,15 til 30 árum síðani. Og svarið er øgiliga lítið heldur hann.

### Ov lítið hent í ES-málinum

Fyri at ítøkiliggera hetta tekur hann fram ES spurningin. –Vit tóku í 1974 eina avgerð um at standa uttan fyri ES. Vit fáa eina handilsavtalu fyrst í 90-unum og fáa eina betraða avtalu síðst í 90-unum, men man hevur ongantíð politiskt viðgjørt, um ES goymir í sær aðrar møguleikar, um vit nú høvdu eitt annað tilknýti til felagsskapin, kanska átøkt tí sum Noreg og Ísland hava. Vit síggja, at íslendingar eru komnir so ótrúliga nógv longri enn vit, bæði á búskaparliga og tí vinnuliga økinum, har vit síggja íslendingar framleiða alla staðni í Europa, har teir bjóða av og eru sjónligir í altjóða høpi, meðan vit føroyingar framhaldandi sita her heima og bøla oman á okkara egnu viðurskiftum.

Tað, sum gjørdi at Ísland kom í gongd, var EBS-avtalan. Hon gjørdi, at man varð noyddur til at gjøgnumføra nakrar reformar bæði í fíggjarheiminum og í vinnulívinum í Íslandi, sum man neyvan hevði gjørt av sínum eintingum. Men av tí at teir fingu EBS-avtaluna, fingu teir líkasum óræði uttanífrá til at fáa tey viðurskiftini uppá pláss. Tað var sambart íslendskum búskaparfrøðingum eisini byrjanin til eina nýggja tíð í Íslandi.

Løgmaður sigur seg bera ótta fyri, at um vit ikki taka hesi viðurskiftini upp til viðgerðar nú, so verða vit so langt afturúrsiglt, at vit rætt og slætt fáa trupult við at fylgja við. Tí meinar hann, at alt samfelagið sum tað er, ikki bara politikararnir, men vinnan og øll onnur skulu viðgera framtíðina og eisini taka nakrar avgerðir um, hvønn veg hetta samfelagið skal flyta seg.

Jóannes Eidesgaard sigur víðari, at hann í hesum førinum als ikki hugsar um okkara viðurskifti við Danmark, tí tað er eitt mál fyri seg. – Í verandi ríkisrættarligu støðu, sum ein meirluti av føroyingum framvegis vil hava okkum í, mugu vit troyta tað potentiali, sum liggur her. Her



*Rúni Hansen, stjóri í Statoil, greiðir frá møguligum framtíðartilgongdum í oljuvinnuni*

hugsi eg um nakað ítøkiligt t.d. at kanna, um okkara samstarv við ES er á nøktandi hátt, hvat eg sjálvur ivist í, at tað er, tí ES inniber so ótrúliga nógvar møguleikar, sum vit als ikki gera brúk av í løtuni og sum kundu komið tí føroyska samfelagnum rættiliga nógv til góðar. Tí tað, sum vit hava saman við ES, er stórt sæð bara ein handilsavtala. Men ES er so ótrúliga nógv annað enn bara handil í dag.

### Vinnubygnaðurin viðgerast

Løgmaður heldur tað eisini vera uppá tíðina, at vit taka upp sjálvan vinnubygnaðin í Føroyum til viðgerðar. – Er tað rætt, at vit eru so fokuserað uppá kappingarførið, at vit gloyma at dyrka tær styrkirnar, sum eru í føroyskum vinnulívi og ikki minst teir møguleikar, sum er í vinnulívinum. Vit fokusera nógv uppá í løtuni, at vit tapa í kappingini, tí onnur lond kunnu framleiða tær vørur vit framleiða bíligari. Tí meini eg, at konseptið er skeivt. Vit dyrka okkara veikleikar og yvirsíggja okkara fyrimunir og styrki. Fyrimunirnir liggja sjálvandi í tí, at vit sita á so stórum ríkidømi. Tað liggur rundan um okkum. Vit kunnu taka burtur úr tí, sum vit halda vera best, og tí eiga vit at kunna marknaðarføra okkum við nøkrum vørum, sum eingin kann taka og kappast við okkum um. Og tað skal ganga uppá kvalitet og feskleika. At kappast við kinverjar skulu vit gloyma alt um. Har hava vit ikki ein livandi tjans. Men kinverjar klára ikki at taka okkum í, at vit kunnu levera feskan dygdarfisk niður á europeiska marknaðin, og tað kann eingin taka okkum í. Tí er konseptið í dag ikki rætt og tí skal høvuðsvinnan til at gjøgnumganga nakrar kolveltandi reformar. Tað tekur so tíð, men onkunstaðni skal tað byrja.

### Virkisætlan í mai

– Nú nertur tú serstakliga við okkara høvuðsvinnu, fiskivinnuna. Men her er so nógv annað so sum KT, ferðavinna og ein komandi oljuvinna og so ein ali-

## Loysa trupulleikar saman

– Tað, sum tí er umraðandi hjá okkum í landsstýrinum, er, at vit fara út og lata upp fyri kjakinum, so vit fáa eitt veruligt orðaskifti um hesar trupulleikar. Tað kann ikki nytta, at vit sita í Tinganesi og skjóta eftir vinnuni, ella vinnan situr og skjýtur eftir okkum. Vit eru í sama báti. Vit skulu finna og loysa trupulleikarnar saman. Og tí er tað gleðiligt, at bæði andstøðan og vinnan reagera positivt. So eg vil hervið bjóða til ein dialog við bæði vinnuna og andstøðuna. Hann er avgjørt neyðugur. Eingin loysir henda trupulleika einsamallur. Tað skulu allir partar vera við til sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.